## Japanar vinna fram í Evropa



Danska blaðið Børsen skrivar, at japanskir bilar vinna fram í Evropa, meðan evropeisku bilmerkini hava eina afturgongd. Marknaðarparturin hjá japansku bilunum er vaksin frá 11 til 13,1 prosent í mun til í fjør. Serliga eru tað Toyota og Nissan sum vinna fram

*Kelda: Motor Magasinet*

## Gongur gott hjá Hyundai



Hyundai Motor Co. í Suðurkorea hevur nýliga lagt fram tað besta roknsparparúrslitið fyri ein ársfjórðing í 37 ára longu søguni hjá konsernini. Umsetningurin var 95,5 milliardir krónur og yvirskotið er vaksið við 8,4 prosentum í mun til í fjør

*Kelda: Motor Magasinet*

## VW Lupo



Sambært Verkehrsclub Deutsland, VDC, er VW Lupo 1,4 FSI við beinleiðis bensininnsprænging, annað árið á rað, ovast á listanum yvir teir mest umhvørvisvinarligu bilarnar í sínum klassa

*Kelda: Motor Magasinet*

Sergjørdur BMW 760 li:

# Tryggur ímóti bumbum og granatum

**Í sínum embæti sum norskur forsætisráðharri hevur Kjell Magne Bondevig fingið ein nýggjan bumbutryggan BMW 760. Bilurin hevur staðið uttan nummarplátur í meira enn ein mánað, orsøkin er, at hann vigar ov nógv til kunna skrásetast**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin*

Norski forsætisráðharrin Kjell Magne Bondevig hevur enn ikki koyrt í sínum nýggja BMW 760, sum bleiv latin umleið hálvan oktober. Orsøkin er, at bilurin sum vigar um 4 tons er 40 kilo ov tungur til at skráseta til fýra persónar. Bilurin vigaði líka yvir 2 tons, áðrenn hann bleiv umbygdur. Hann hevur 445 hk og koyrir frá 0-100 km/t uppá 5,5 sek.

Hesin BMW 760 er spekkaður við trygdarútgerð og armeraðum pansarastáli, hann skal eisini eitast at vera bumbutryggur og kann standa ímóti minum og granatálopum og skotum frá øllum kendum vápnum. Rútarnir eru 7 cm tjúkkir og framrúturin kann í eini neyðstøðu brúkast sum neyútgongd.

Kunningarstjórin hjá norska Statsministeriinum, Øivind Østang, sigur at bilurin er bílagdur hjá BMW eftir ávísum spesificatiónum, so tað má verða teir, sum koma at loysa trupulleikan. Hann roknar við at bilurin fær nummarplátur um einar tvær vikur.




*Bumbutryggi bilurin hjá Kjell Magne Bondevig er ein umbygdur BMW 760 iL*



*BMW 760 Li innan*




*BMW 760 Li við 445 HK*



# Suzuki Grand Vitara LX 7 sum diesel

**Tann stóri 7-persóna Suzuki Grand Vitara LX7 er nú komin við einum 2,0 litur commonrail turbodiesel motori við 109 hk. Bilurin er eisini broyttur nakað við nýggjum forlyktum og kølaragittari**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin*

Tað vísir seg at MPV og jeepar eru ikki nóg áhugaverdir, uttan at teir eisini fáast við dieselmotori. Tann størsti Suzuki, Grand Vitara XL7, sum einans hevur fingist við 2,7 litur V6 bensinmotori, fæst nú eisini við 2,0 litur commonrail turbodiesel motori við 109 hk. Framman er bilurin eisini broyttur við nýggjum forlyktum og kølaragittari. Grand Vitara LX7 2,0 TD er annars væl útgjørdur við heilautomatiskum klimaanleggi, el-síðuspeglum við hita og hita í setrunum. Bilurin er ein 4x4 við Drive-Select, sum eisini kann verða drivin av tveimum hjólum. Hann kann draga ein viðfestisvogn, sum vigar upp til 1850 kilo.

Frá bilasøluni, Sp/f Eyðbjørn Hansen, verður sagt, at sum 7 persónabilur kostar Grand Vitara LX7 2,0 TD kr. 305.000,- og 256.000,- sum vøruvognur.




*Suzuki Grand Vitara XL7 2,0 TD við 109 hk. Framman er bilurin eisini broyttur við nýggjum forlyktum og kølaragittari*

# Suzuki Alto sum pizzabilur

**Millum allar teir ymisku bilarnar sum koyra í býnum, eru pizzabilar blivnir alt meira vanligir í ferðsluni. Pizzakjallarin í Niels Finsensgøtu hevur nýliga dekorerað sær ein nýggjan Suzuki Alto pizzabil**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

At taka telefonina og ringja til eina pizzabar og fáa pizzair koyrdar heim er ein tænasta sum verður nógv brúkt í Havnini, tað síggja vit á øllum pizzabilunum sum koyra býnum.

Fyri halvumtriðja ári síðan byrjaði Regin Bláhamar í Havn við Pizzakjallaranum í Niels Finsensgøtu 21. Har kunnu fólk eisini eftir eini pizza og fáa hana koyrda heim. Vanligar dagar er útkoyringin frá kl. 17-23 og í vikuskiftinum frá kl 14-23.

Til ber eisini at bíleggja ein pizza yvir internetið, adressan er: www.pizzakjallarin.fo.

Pizzakjallarin hevur tveir bilar til at koyra pizzaðir út av húsinum við. Regin Bláhamar sigur at hann keypti ein brúktan Suzuki Alto, sum hann hevði í eitt ár. Hesin bilurin royndist so væl, at hann nú hevur keypt sær ein Alto av nýggjasta modellinum. Bilurin, sum Team 85 hevur dekorerað við búmerkjunum hjá Pizzakjallaranum, er kvikur og økonomiskur. Motorurin er ein 1,1 litur við 63 hk.

Bilurin koyrir umleið 100 kilometrar um dagin.




*Nýggi Suzuki Alto pizzabilurin hjá pizzakjallaranum*